THE NEW SPEAKERS NETWORK

COST
EUROPEAN COOPERATION
IN SCIENCE AND TECHNOLOGY

# Nýmælt í fleirmælta Evropa

## New Speakers in a multilingual Europe



*"Limirnir í okkara netverki eru áhugaðir í tvímæltum og fleirmæltum persónum, ið ferðast tvørtur um sosial og málfrøðilig mørk, sum taka til sín og laga seg til nýggjar málsligar umstøður"*

Okkara COST stuðlaða netverk er partur av millumstjórna rammuavtalu um evropeiskt samstarv innan vísindi og tøkni (COST).

*"Our network members are interested in bilingual and multilingual speakers who cross social and linguistic boundaries, adopt or adapt themselves to new linguistic spaces"*

Our COST funded network is part of an intergovernmental framework for European Cooperation in Science and Technology (COST).

**At læra mál kann vera gevandi, men viðhvørt er neyðugt at stuðla soleiðis, at nýtsla av nýggjum málum verður ein jalig uppliving.**

**Mál eru sera týdningarmikil fyri at fáa atgongd til útbúgving, størv, sosialar tænastur, heilsurøkt, lógarverk og at gerast partur av samfelagnum.**

Alheimsgerð, økt fólkaflyting, netverkan tvørtur um landamørk og nýggjar búskaparskipanir gera sítt til, at fleirmæli er vorðið alt vanligari.

Fyri børn, ung og vaksin kann tað at tosa eitt nýtt mál vera stuttligt, men eisini avbjóðandi. Tað kann vera, at tey fáa at vita, at úttala teirra ikki er røtt. Kanska hava tey ikki høvi at brúka málið í einum stuðlandi umhvørvi.

Kanska manglar nýmæltum fulla og javnbjóðis atgongd til sosialar tænastur, arbeiðsmøguleikar ella at taka lut í politikki.

Málsliga grundaður ójavni er lítið kannaður, men hann kann verða ein møgulig avbjóðing, tá talan er um evropeiska sameining, sosiala savningarmegi og búskaparliga menning.

**Okkara endamál er at:**

- Gera politisk tilmæli
- Kanna nýggjar greinar innan gransking
- Menna vegleiðingar til stovnar og virki um, hvussu farast kann fram í sambandi við fleirmæli í nútíðar samfelagnum
- Greiða frá upplivingum hjá nýmæltum og vísa á góð dømi

**Learning languages can be rewarding but sometimes support is needed to make using new languages a positive experience.**

Language is important for accessing education, employment, social services, healthcare, the law and for community participation.

Globalisation, more movement of people, transnational networking and new forms of economy are making multilingualism the norm.

For children, young people and adults, speaking a new language can be fun but also challenging. They may be told that their accent isn't right. They may lack opportunities to practice in a supportive environment.

New speakers may not have a full and equal access to social services, job opportunities or political participation.

Language-based inequalities are little studied, but they pose a potential challenge to European integration, social cohesion and economic development.

**Our objectives:**

- Make policy recommendations
- Explore new avenues of research
- Develop guidelines for organisations on how to deal with multilingualism in contemporary society
- Share 'new speaker' stories and examples of good practice

# At skilja møguleikar og avbjóðingar við at læra eitt nýtt mál

- Evropeiska granskingarnetverkið fevnir um granskarar úr 28 londum.
- Granskar upplivingar hjá 'nýmæltum' í sambandi við migratión, útbúgving, heilsu, ungdómsmentan, arbeiðspláss, lógarverk, familjulív, sjálvboðin feløg (NGOs).
- Høvuðsbólkar, ið granskað verður í, hoyra málsliga til:
  - ★ økisminnilutar
  - ★ tilflytarar
  - ★ tvørtjóða arbeiðsmegi

**Vit liva í einum fleirmæltum Evropa, og í gransking okkara ynskja vit at skilja, hvat tað vil siga fyri nýmælt, at læra eitt nýtt mál og brúka tað bæði í sosialum og professionellum høpi.**

*Samskipari: Bernardette O'Rourke, Heriot-Watt universitetið*
*Varasamskipari: Joan Pujolar, Universitat Oberta de Catalunya*

**We live in a multilingual Europe and in our research we want to understand what it means for 'new speakers' to learn and use a new language both socially and professionally.**

*Chair: Bernadette O'Rourke, Heriot-Watt University*
*Vice-Chair: Joan Pujolar, Universitat Oberta de Catalunya*

# Understanding the opportunities and challenges of becoming a 'new speaker' of an additional language

- European research network involving researchers from 28 countries.
- Researching the experience of 'new speakers' in migration, education, healthcare, youth culture, the workplace, legal systems, families, Non-governmental Organisations (NGO's).
- Main profiles of speakers:
  - ★ regional minorities
  - ★ immigrants
  - ★ transnational workers

THE NEW SPEAKERS NETWORK

COST
EUROPEAN COOPERATION
IN SCIENCE AND TECHNOLOGY

## Nýt okkara heimasíðu til at:

- Finna gransking og kunning um nýmælt í økjum, har fleirmæli er vanligt
- Lesa um stakkanningar í ymiskum høpi
- Kunna um tína egnu gransking og verkætlanir
- Greiða frá og menna góða siðvenju, tá talan er um málsligt fjølbroytni

Kom við í netverk okkara:
http://www.nspk.org.uk/contact-us.html

## Use our website to:

- Find research and information on new speakers in multilingual contexts
- Read about case studies in a range of contexts and sites
- Share your own research and projects
- Share and develop good practice for managing linguistic diversity

Join the network:
http://www.nspk.org.uk/contact-us.html



## Set teg í samband við | Get in touch


New Speakers Network
c/o School of Social Sciences
Heriot-Watt University,
Edinburgh,
EH14 4AS
Scotland

+44 (0)131 451 4200
costnewspeaker@gmail.com


twitter.com/COSTNewSpeakers
www.facebook.com/COSTNewSpeakers